# Hans Jákup í Stovuni 100 ár

## (17/8 1901 - 17/8 2001)



## 2. partur

eftir Virgar Tórarson Dalsgaard

### Hjartamálið SOSIALURIN

Eftir skemdar-episoduna í Klakksvík (1938) verður Hans Jákup enn meira aktivur á *Sosialinum* og í *Suðurstreymoyar javnaðarfelag*. Hetta fær avleiðingar — sum so mangur annar javnaðarmaður noyðist hann at standa fyri øgiligum skotum undir krígnum og heilt fram til heystið 1950. Ágangurin var óvanliga herviligur, ikki minst táið hann fekk landbúnaðarráðgevarastarvið í 1942, og brikslið var ofta niðan fyri alt sømuligt mark. Eitt nú førdu fólkaflokksmenn og seinni tjóðveldismenn leingi eina útspillingarkampagnu, har teir løgdu Hans Jákup undir at skriva stuttsøgur og politiskt tilfar til *Sosialin* í arbeiðstíðini. Nú skuldu øll vápn brúkast. Vildi hann ikki vera í parti við fullveldismonnunum, so skuldi nervakríggj gera hann moyran, men skálvíkingar eru bædi seigir og treiskir, so hvørki Hans Jákup ella hinir javnaldrarnir vildu lúta, ei heldur fekk man teir at svíkja Petur Mohr Dam.

Stutt fyri annan heimsbardaga var *Feðgar á ferð* komin. Henda bók er allarhelst í hvørjum føroyskum heimi í dag, og tí óneyðug at umrøða nærri, men leggjast kann afturat, at tað var ikki, fyrr enn hon varð lisin upp í útvarpinum seinast í 50-árunum, at hon gjørdist almannaogn. Hon kom bæði í Varðanum og í *Sosialinum*.

### Einki blað, eingin flokkur

Annars var tað ofta í *Sosialinum*, at Heðin Brú lat sítt tilfar koma av fyrstantíð. Yvirhøvur skrivaði hann nógv í *blaðnum*, sum hann alla sína tíð var sera góður við og trúgvur yvirfyri. Eg minnist manga ferðina, har pápi mín og hann tingaðust um, hvat júst tá skuldi gerast fyri, at *Sosialinum* skuldi vera lív lagað. Her var Hans Jákup altíð konsekventur sum P. M. Dam: *Einki blað, eingin flokkur,* og tí *skuldi* blaðið út; og tað skal hann eiga, - hann dugnaði altíð blaðnum, bæði fíggjarliga, við praktiskari hjálp og tilfari. At *Sosialurin* treivst væl og kom regluliga út, var fyri Hans Jákup eitt brennandi hjartamál. Her drógu hann og P. M. Dam altíð eina línu.

Undir krígnum stjórnaðu Hans Jákup og William Heinesen einari serligari síðu í blaðnum. Henda síðan æt *Føroyar í dag*. Hetta var í tí tíðini, tá ið tað enn var saft og kraft í *Sosialinum*! Tá ið blaðið framvegis kundi øsa og forarga tað kyniska borgaraskapið og fáa tað ábyrgdarleysa fullveldisliðið at piprast og rodna av skomm.. Men blaðútgáva var ikki minni trupul tá, enn hon er í dag.

Serliga minnist eg, hvussu ovurfegin Hans Jákup var, tá ið menn fyrst í 50unum høvdu sett læraraskúlanæmingin, *Villa Sørensen* sum blaðstjóra. Hann ringdi í heilum til pápa at spyrja, um vit nú kundu rokna við, at Villi fór at halda fram, eftir at hann var vorðin liðugur sum lærari. Tað gjørdi Villi, og Heðin Brú og hann gjørdust vinmenn fyri lívið.

Villi sjálvur fortaldi mær seinni, hvussu ótrúliga sterkur moralskur stuðul, Heðin Brú ofta var fyri seg persónliga, tá ið Villi var úti fyri ágangi, tí sjálvt um Hans Jákup hevði nógv annað at takast við, hevði hann altíð tíð at samráðast um *Sosialin*. Hann var altíð góður at heita á og alfúsur at styðja tad blaðið, sum hann helt vera *lívsneyðugt fyri javnaðarflokkin,* og harvið fyri ta stóru lønmóttakarafjøldina. Hevði Hans Jákup upplivað tann vatndeyða *Sosialin*, vit hava í



dag, hevði hann harmast og syrgt.

### Morgunmenn

Hans Jákup hevdi leingi ætlað sær at skriva eina skemtiliga søgu um polit isku viðurskiftini undir krígnum. Hann hevði gjørt fleiri royndir og skitsur, men tíanverri kom henda bók ongantíð. Eg minnist ofta, - tað hevur verið í árunum frá 1946 til 1949, at hann las stubbar upp fyri m.a. Petur Mohr Dam, Martini Joensen, pápa og fleiri. Hetta vóru stuttligar frásagnir um fullveldisørskapin í kríggsárunum. Fullveldishetjur tóku seg sjálvan í blóðigum álvara, - eisini tá - og álvarsmenn eru aloftast láturligir. Hans Jákup og áhoyrararnir vóru, ið hvussu so er ísakaldir í látri, meðan hann las.

So sum eg minnist, var evnagongdin um tað óhugnaligu politisku terrortíðina, serliga í Havn við bæði fullveldisreypi, myrkalegging og Fólkaflokki. Hetta var ein ræðulig tíð fyri ”øðrvísi hugsandi.” Um friðarlig hampafólk vágaðu sær heim eftir leggingartíð, rendu tey seg viðhvørt í eina uppøsta ungfylking av *spákandi* pseudomilitantum flokksmonnum, sum vóru harðmæltir, uppblástir, og sum gjørdu seg stívari og herðabreidari enn gott var,.

Hevði man ikki tann rætta nationala litin og møtti slíkum territorialt patruljerandi **fanatikarum** á náttartíð, var ikki lukkuligt; tí hetta vóru strangir og stívspákandi frelstir álvarsmenn, sum ikki tolereraðu nakað profant bros, - tey ófrelstu firnaðust eitt sindur og leitaðu sær út í síðugøtur, skuldu tey koma snikkasleys heim.

Var tað nakar, sum hevdi maktað at dramatisera hesa tragikomisku tíðina, so var tað Heðin Brú, og hann brúkti júst máliskuna ”annarsleiðis hugsandi” ironiskt um seg og sínar partamenn. Men vit vita, at hann var óbeinleiðis trýstur og noyddur til at lata bókaætlanina falla. Tað skuldi vera ov nógv lyklatilfar uppií, men hvat so? — Tað var um oddamenn og lýdnar fylgisneytar í eini intolerantari og larmandi fundamentalistiskari rørslu, sum hevði yvirfúsað og verbalt terroriserað hampafólk í meira enn tíggju ár.

**Tað hevði klætt føroyskum journalistum, um teir erligt tordu at upplýsa um hesa tíðina ella havt samrøður við tey, sum enn eru á lívi og *tá* tordu at andøva ímóti fullveldisvillskapinum.**

Akkurát hvussu bókin skuldi eita, veit eg ikki, men hon skuldi taka við, har sum *Leikum fagurt* endar, beint fyri bóndauppreisnina í 30unum. Tað er ikki av tilvild, at vit til allarsíðst í hesi bók fáa paroluna hjá kapitalistaflokkinum: *Vit skullu vera nationalir!*

Og so mikið veit eg, at hann las eitt árið til ein bókadag (1950, haldi eg) eitt kapittul av hesi nýggju bók, og tað kallaði hann *Morgunmenn*. Hann fekk fast av tí upplestrinum, nógv løgdust á hann vid ymsari chikanu. Tað var annars, ørminnist eg, um eina nátt undir krígnum. Í orðinum *Morgunmenn* kundi vera nógvur symbolikkur. Spell var fyri okkum føroyingar, at henda bók aldri kom — eg kann kortini ikki halda, at alt handritið er burtur, so kanska fáa vit einaferð nakað av hesum tilfari at síggja, um tað kemur í rættar hendur.

### Fullveldis-lobby aftanfyri ?

Tað er eitt faktum, at teir ovurnationalu, sum sótu á banka- og vinnulívi førdu ein ódámligan sorteringspolitikk undir krígnum. Nógvir menn fingu t.d. hvørki kjans á sjógvi ella landi, um teir ikki váttaðu serliga nationalpolitiska frelsu ella -trúgv. Skelkaði javnaðar- og sambandsfólk, hartil nógv sjálvsstýrisfólk høvdu andstygd fyri slíkum; hesin maktpolitikkur píndi einamest Hans Jákup og hansara rættvísiskenslu, og tað er heilt ivaleyst, at skaldsøgan um *Morgunmenn* var ætlað sum ein náðileys uppgerð við fíggjarligu neyðtøkuna av fólki og tann terror-líknandi nationala yvirgang, sum nógv máttu líða undir krígnum.

Heðin Brú var ofta illa viðfarin sum javnaðarmaður, men hann var eisini illa við av tí, sum hendi við einum av okkara løgtingsmonnum, ið varð fluttur burtur við makt frá eini atkvøðugreiðslu á tingi. Yvirgangsmenninir vórðu ongantíð revsaðir. Hann kendi á sær beinleiðis *skyldu* at skriva um terrorin og tey neyðars korini hjá tí ognarleysa slitmanninum. Tí, sum hann sjálvur plagdi at taka til: *”Eg havi mítt fasta arbeiði, so tað er eingin, sum kann taka breyðið frá mær!”*

Seinast í 40unum hevur hann skrivað nógvar stuttsøgur afturat og er viðurkendur sum okkara suverena skald. Tá ið vit vita hetta, er tað gátuført, hví *Morgunmenn* ongantíð kom, tí tað skortaði ikki uppá fyrispurningar frá fólki, um *nær* skaldsøgan fór at koma, og tað er heilt vist, at so seint sum miðskeiðis í 50unum minnist eg, at Hans Jákup tosaði ofta og leingi vid fleiri mans um, hvussu tað var komið áleiðis vid bókini. Tá hevði hann avgjørt ikki slept ætlanini og hevdi góðar vónir um at fáa hana lidna.

Meistarligar stuttsøgur sum eitt nú *Tvinnir eru kostirnir, Bolli í Grágerði, Loðin sól* etc. eru avgjørt skrivaðar av miskunnsomum socialdemokratiskum humanisti, men ikki beinleiðis av tí samfelagskritikara, sum kravdist til at fullfíggja *Morgunmenn*

Men vit vita eisini, at Hans Jákup alla tíðina, serliga táið vit koma í 50-árini, er undir órímuliga hørðum trýsti frá tí nationalu lobbyini um, at hann *skal* lata vera við at geva bókina út, ið hvussu er ikki, fyrr enn tað er meira fráliðið.

Hitt javnadarskaldið, **Martin Joensen** fær eisini av at vita um somu tíð. Hann er nøkur ár bladstjóri á Sosialinum. Hann fekk koyrilin frá nationalistunum og kendi seg so forfylgdan, at hann fekk skelk fyri lívið. Men vitið eftir góðu lesarar: Í næsta ár, tá ið Martin fyllir øld, fer tað ósmædna kulturmonopolið at kanna sær hann og skammrósa *honum* við eini littererari keipumynd. Men teir fara valla at fortelja fólki, at tá ið Martin livdi, mátti hann bókstavliga sníkja seg fram vid húsaveggjunum í Havn fyri ikki at vera álopin av ovurnationalum ørvitisknokkum.

### Arrogant og aggressivt asfaltslið

Tá ið kríggið hæsaði av, kom eitt nýtt fyribrigdi inn í føroyska samfelagið — hetta var tað heimvenda asfaltsliðið, sum hevði krokað og ligið í skáa av danska finanshøvuðskassanum øll stríðsárini. Har vóru sáttligir hampamenn ímillum, treyðugt so, men teir allarflestu sveimaðu heilt í leysum lofti og dugdu ikki at skatta dýpi hjá heimaføroyingum. Asfaltsmenninir vóru ikki beinleiðis lítillætnir.

Teir vildu ordna alt, blanda seg uppí alt og hildu seg vita alt, bara tí teir høvdu fingið onkra hissini útbúgving. Útbúgving gevur vitan, men ikki nógva fornuft. Teir ovurlærdu, málreystu og ráðisligu asfaltsføroyingarnir hildu seg liggja inni við so nógvari fornuft, at teir fyri tað allarmesta runnu við høvdinum undir arminum. Teir herjaðu næstan á hvørja skrivstovu, tí teir vildu størv og sleppa at liva og leika, sum teir høvdu í lestrartíðini í Danmark, og teir vildu hava góð størv, og har, sum ikki ein skrivstova var, har mátti ein innrættast til teirra beinanvegin.

Hesir aggressivu og irrationellu menn og hesar kvinnur við høvdu skund, febrilskan skund. Alt í Føroyum, sum tey annars søgdu seg vera so góð við, var bara *so banalt og so provinsielt* og heimaføroyingar vóru plágaðir av heimføðisskapi og *simplari idioti*. Hetta var orðalagið, men nú skuldi landið takast — teir hopleysu heimføðingarnir høvdu bara *ver so góðir* at rætta seg eftir teimum.

Nú skuldu vit *bygdasligu* landsmenn teirra fáa annað at síggja, og fyrst og fremst skuldu vit hava loysing, tí tað var universalloysnin og svarið uppá alt, og *tá* var Paradís fyri stavn. Flestu heimaføroyingar vildu als ikki rætta seg eftir teimum, men asfaltsfólki dámdi ikki innvendingar og argumentatión, tey blivu í øðini, um man loyvdi sær at ivast, andøva ímóti ella debattera teirra genialu uppskot. *Tað* var ikki fyri mark, tí tey vistu betri, tey høvdu lært alt *møguligt* niðri í Danmark.

Nógv hildu hesar harðmæltu breggjarar vera troyttandi, meðan onnur sum t.d. Heðin Brú mest flentu at teimum, tí tað var sanniliga ikki lætt at taka tað larmandi liðið av politiskt frelstum í álvara. Heðin fekk eisini fast afturfyri frá hesum innbilsku **fanatikarum**, sum **flestallir** endaðu í nýstovnaða tjóðveldisflokkinum. **Nakrir** teirra kallaðu t.d. Heðin Brú fyri *bóndaskald, heimføðing, bygdafrell, kolsvartan sambandsmann og socialdemokratiskan revisionist*. Hetta vóru nøkur av teirra rakstrarrópum. Ta seinastu karakteriseringina sum revisionistur var Heðin Brú bara fegin um, tí hann var sera langt frá allari stalinismu. Hesar ovurklóku Holberg-typur vildu jú *belæra* heimaføroyingar um politikk, skaldskap, mál og tilveruna sum heild! Men fáur teirra hevði nakra hylling á at skriva føroyskt. Oddamaður teirra skrivaði meira enn hálvíslendskt í sínum løgna óføroyska málgagni.

### MALLA

Um heystið 1949 skrivar Heðin Brú so til stuttleikar eina fitta lítla stuttsøgu um prototypurnar uppá eini nýliga heimvend asfaltshjún. Søgan eitur *Malla*, og var í mun til tað, sum annars varð sagt manna millum um asfaltarar sera spøk og sakleys. Hon varð lisin upp í ymiskum *fora* í langa tíð, bæði privat og í afturlatnum felagsskapum, og fólki dámdi yvirhøvur væl. Tey hildu søguna vera gott *undirhald*, men so er tað, at fleiri vilja hava hana almannakunngjørda. Hon kemur sjálvan jólaaftan 1949 í *Sosialin*. Og so var jólafriðurin úti í Havn.



*Skálavík, bygdin sum prentaði íblásturin í sál skaldsins*